# Eldur í bili og oljudálkingar

**Tað hevur veirð stak friðarligt hjá løgregluni um vikuskiftið, og bert í einum føri vóru teir boðsendir til harðskapsmál, sum tó ikki var álvarsligt**

Leo Poulsen

Tveir tilburðir vóru um vikuskiftið, har eldur og roykur mundu gjørt av við bilar.

Í fyrra førinum var talan um ein bil, sum eldur kom í uppi í Essalág. Ein maður hevði verið ein longri biltúr, og setti bilin í túni. Innkomin varnast hann, at tað rýkur úr bilinum, og áðrenn hann fekk tikið stig at sløkkja, var alt motorrúmið brent upp.

Bilurin bleiv koyrdur niðan á Bileftirlitið, har hann nú verður kannaður fyri at vita, hvør orsøkin til eldin var.

Hetta hendi fríggjakvøldið um 21.30-tíðina.

Leygarmorgunin um 10.30-tíðina fekk løgreglan boð um nógvan royk í Norðskálatunlinum. So tjúkt var, at bilar vendu aftur, tí teir óttaðust fyri trygdini at koyra gjøgnum tunnilin.

Av løgreglustøðini var tunnilin stongdur við bummum í báðum endum, til greiða fekst á, hvør orsøkin til nógva roykin var.

Tað vísti seg at roykurin kom frá einum bili, ið varð vorðin so heitur av einari ella aðrari orsøk. Tað kom kortini ongantíð eldur í bilin, sum síðani varð togaður út úr tunlinum aftur.

Av løgreglustøðini verður sagt, at tunnilin var stongdur í einar 50 minuttir.

### Olja á sjónum

Fríggjadagin um 14.00-tíðina fekk løgreglan boð um, at 200 litrar av olju vóru farin á sjógvin. Óhappið hendi, tá Drelnes bunkraði. Sløkkiliðið í Havn kom á staðið og tók oljuna upp aftur, og skipið fær nú eina bót.

Eisini í Norðdepli lak ein bátur olju á sjógvin. Hetta hendi um 16.00-tíðina leygardagin og eisini í tí førinum verður talan um bót.

Leygarnáttina vaknaði ein maður úti við Velbastaðvegin við buldur og brak. Tað vísti seg, at ein bilur hevði rent á kirkjugarðin. Løgreglan kom á staðið og handtók bilføraran, sum verður ákærdur fyri at hava koyrt ávirkaður. Eisini fann løgreglan narkotika uppi á manninum. Tveir persónar vóru í bilinum.




*Undir bunkring fóru 200 litrar av olju á sjógvin, sum Sløkkiliðið í Havn tók upp aftur*
*Modellmynd*

Annars stendur lítið og einki í døgnrapportini hjá løgregluni. Teir vóru boðsendir tvær ferðir alt vikuskiftið, fyrru ferðina til Kaffihúsið, har tveir mans spældu hund og gjørdu ónáðir. Teir gjørdu seg kortini ikki inn á nakran, men tá teir hildu fram eftir at løgreglan hevði tosað teir til sættis, varð annar maðurin tikin við á løgreglustøðina.

Seinnu ferðina var leygarnáttina, tá tveir mans komu upp at kjakast á Cleopatra, men heldur ikki her var talan um nakað álvarsamt.

Og sunnumorgunin varð boðað frá omanlopi á Viðareiðisvegnum. Hetta var kortini ikki álvarsamt heldur, og bilarnir fingu koyrt, men Landsverk ruddaði steinarnar burtur.

---

# Klaksvíkingar í bíðistøðu

**- Vit viðgera málið í løtuni, annars havi eg onga viðmerking, fyrr enn ein niðurstøða er gjørd, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri, um húkamálið**

Leo Poulsen

Fríggjadagin kom Landsverk við sínari avgerð í sonevnda húkamálinum, og boðini eru greið: Húkurin skal takast niður aftur.

Húkurin varð upprunaliga settur upp til Sjómannadagin í Klaksvík, men meiningin hjá fyrireikarunum var alla tíðina, at hann skuldi verða standandi. Trupulleikin er bert tann, at húkurin stendur í einari rundkoyring, sum er partur av landsvegakervinum, og tískil er Landsverk avvarandi myndugleiki. Og Landsverk vil hava húkin tiknan niður.

Gunvá við Keldu, borgarstjóri, sigur, at tey í løtuni hava málið til viðgerðar, men hon dugir ikki at siga, nær ein endalig støða verður tikin til, antin býráðið fer at kæra avgerðina hjá Landsverk til Vinnukærunevndina.

– Tað verður helst greitt í morgin, ella í hvussu er ein av fyrstu døgunum, sigur Gunvá við Keldu.

Eisini fyrireikararnir av Sjómannadegnum bíða eftir býráðnum.

– Vit eru í bíðistøðu í løtuni. Málið er aftur hjá býráðnum, so vit bíða bara eftir, hvørja støðu teir taka, og sum skilst á lagnum verður avgerðin hjá Landsverk helst kærd, sigur John William Joensen, ið er ein av fyriskiparunum av Sjómannadegnum.

Hann sigur, at tað alla tíðina var ætlanin, at húkurin skuldi verða standandi, og tað kemur tí rættiliga óvart á, at Landsverk nú hevur kravt húkin tiknan burtur.

– Tað eru fleiri dømir um aðrar rundkoyringar við ymiskum lutum í, sum fáa loyvi at standa, sigur John William Joensen.

*Mest umrøddi húkurin í heiminum skal ikki longur standa í rundkoyringini í Klaksvík*

